## Týskland borgarligt

Aftan á valið í gjár kann CDU/CSU skipa samgongu saman við Fríu Demokratunum ístaðin fyri sosialdemokratunum, sum fingu ein dyggan frammaná í gjár. CDU og systirflokkurin CSU fingu 33,8 prosent av atkvøðunum. Tað er 1,4 prosentstig minni enn á valinum í 2005. Harafturímóti fekk tann lítli borgarligi flokkurin FDP 14,6 prosen, og kann tryggja Angelu Merkel eina brgarliga stjórn. Sosialdemokratiski flokkurin SPD var tann stóri taparin og fekk 23,0 prosent ímóti 34,2 prosentum á valinum í 2005. Tey Grønu fingu 10,7 prosent, og sosialistaflokkkurin Die Linke fekk 11,9 prosent.



## Ung einki at gera

Hagtøj hjá OECD vísa, at ungfólk í stórum tali eru hvørki til arbeiðis ella í skúla, men ganga fyri einki. Støðan er tann sama í Danmark, og sambært Jyllands-Postinum hava 10.000 donsk ungfólk einki at fara upp til. Tað kemur fram í einari kanning, sum danska arbeiðsgevarafelagið hevur gjørt. Hon vísir, at 21.000 ung millum 15 og 17 ár eru hvørki í skúla ella í læru, og at 10.000 teirra hava heldur einki arbeiði. Bertel Haarder, skúlamálaráðharri, ásannar fyri blaðnum, at talan er um ein stóran trupulleika, sum lutvíst stendst av altjóða fíggjarkreppuni. Stjórnin fer at taka neyðug stig nú, sigur hann.

# Skeltið í Kollafirði sleppur at standa

**Føroya Rættur hevur gjørt av, at umstrídda lýsingaskeltið í rundkoyringini í Kollafjarðardali skal ikki takast niður aftur**

LÝSINGASKELTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hetta lýsingaskelti við rundkoyringina í Kollafjarðardali, hevur foragað nógv, men nú hevur Føroya Rættur gjørt av, at tað sleppur at blíva standandi. Myndian tók Jens Kristian Vang*

Lýsingaskelti, sum stendur í rundkoyringini í Kollafjarðardali, sleppur at standa í friði.

Tað hevur Føroya Rættur nú gjørt av.

Fútin hevði annars ákært Fjarðahús, sum eigur skeltið, fyri brot á náttúrufriðingarlógina og kravt, at skeltið verður tikið niður.

Fútin kravdi eisini, at verður skeltið ikki niðurtikið eftir eina hóskandi freist, skal Fjarðahús hava tvingsilsbøtur, til skeltið er burtur.

Skeltið hevur staðið uppi í eini fýra ella fimm ár og tað var rættiliga skjótt, at røringur kom í og at myndugleikar av ymsum slagi fóru at gera vart við seg.

Tað endaði við at friðingarmyndugleikarnir komu upp í og tá varð málið latið fútanum, tí mett var, at tað var brot á náttúrufriðingarlógina at seta skeltið upp har.

Sostatt ákærdi fútin Fjarðahús fyri at bróta náttúrufriðingarlógina.

Og nú er málið so viðgjørt í rættinum, men úrslitið var, at fútin fekk ikki viðhald í síni ákæru.

Tvørturímóti fekk Fjarðahús viðhald í, at skeltið skal hava loyvi at standa.

### Tætt bygt ella ikki

Tann stóri spurningurin í hesum sambandi er, um rundkoyringin, har skeltið stendur, er at rokna sum tætt bygt øki ella ikki.

Í Føroyum er tað nevniliga ikki loyvt at hava útilýsingar á gøtum, vegum og plássum burtur frá tætt bygdum øki.

Ákærin helt ikki, at nakar ivi kundi vera um, at rundkoyringin í Kollafjarðadali lá uttanfyri tætt bygt øki.

Hann førdi fram, at er hetta skelti lógligt, fara skelti at skjóta upp sum hundalond runt umkring, tí verður rundkoyringin í Kollafjarðardali talt upp í tætt bygt øki, er tað tætt bygt allastaðni.

Tí vildi hann hava skeltið burtur.

Hetta er fyrsta mál av hesum slagnum í Føroyum og fútin helt, at ein bót upp á 3000 krónur var hóskandi, men so skuldi tey á Fjarðahúsi eisini betala 3000 krónur í bót um mánaðin, til skeltið er tikið burtur.

### Ongin munur

Verjin hjá Fjarðahúsi var alt annað enn samdur.

Hann dróg fram eina ørgrynnu av dømum um lýsingaskelti, sum eftir hansara tykki, standa í minst líka bygdum ella óbygdum øki, sum hetta skelti. Hann nevndi eisini fleiri dømi um skelti ymsastaðni í Havnini.

Verjin vísti eisini á, at lógin gjørdi ikki mun á leysum lýsingaskeltum og lýsingum, sum vóru málaðar á húsaveggir.

Í hesum sambandi sipaði hann til stóru lýsingina fyri Jolly Cola, sum hevur staðið málað á endaveggin á kappróðrarneystinum í Hósvík í minst 16 ár, uttan at nakar hevur talað at.

Og hann helt, at hetta drálið eigur at koma lýsaranum til góðar.

### Fríkendur

Dómarin tók undir við verjanum og sotatt vóru tey í Fjarðahúsi fríkend.

Í hesum sambandi leggur dómarin dent á, at skeltið stendur innangarðs, har tað ikki krevst loyvi frá friðingarmyndugleikunum at byggja.

Hann meinti eisini, at rundkoyringin er eitt framhald av Kollafjarðar bygd, sum sjálvandi má roknast sum fjølbygd øki.

Fyri at styðja uppundir hesa, nevnir dómarin eisini, at, at hús standa ymsastaðni rundan um rundkoyringina og samstundis er gongubreytin løgd ígjøgnum gongubreytina og einar 100 metrar longur inn í dalin.

Dómarin leggur afturat, at í hesum føri hevur tað ongan týdning, at húsini kring rundkoyringina eru yvir 100 metrar burtur og at rundkoyringin er í øki, har tað er loyvt at koyra 80 kilometrar um tíman.

Nú skal so Fútin gera av um málið skal skjótast inn fyri landsrættin.

# Fær sjey mánaðir at akta lógina

**Eftir togarí í fleiri ár, er tað nú greitt, at ein bóndi noyðist at flyta eina bingjum hann hevur havt í haganum at goyma hoyggj í**

BINGJUSTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Eitt áralangt stríð um eina gamla bingju, fær nú loksins ein enda

Talan er um eina 40 føt bingju sum ein bóndi hevur brúkt at goyma hoyggj í

Men tað hevur tikið útvið 20 ár at fáa enda á sakini og nú má bóndin taka bingjuna burtur - ella í minsta lagi flyta hana einar 100 metrar.

Áðrenn hann setti bingjuna upp, spurdi hann bæði kommununa og Landsverk, men haðani var ongin viðmerking.

Bingjan stendur einar 200 metrar frá eini á og tað er ólógligt, tí av tí, at áin er meiri enn fýra metrar breið, krevur náttúrufriðingarlógin, at hon er minst 300 metrar burtur frá.

Tí varð málið tikið upp og síðani hevur tað reikað runt í skipanini, har bæði friðingarmyndugleikar, kommunustýri og Føroya Rættur hava verið upp í leikinum.

Men nú fær tað ein enda. Føroya Rættur dømdi nakað síðani bóndan at fáa bingjuna burtur av staðnum, men hann hevur ikki aktað.

Bóndin skilir nevnliga ikki, hví akkurát hansara bingja skal takast burtur úr rúgvuni, tí tað stendur eitt ótal av bingjum og sløðist í haganum.

Trupulleikin er, at hansara bingja stendur nærri enn 300 metrar frá eini á, sum er minst fýra metrar breið og tað er munurin á hansara bingjum og øðrum bingjum.

Tí er hann einaferð enn drigin í rættin, har ákærin vil áleggja honum at betala bót fyri at sýta at gera eftir boðum. Men harafturat skal bóndin hava tvingsilsbøtur, til bingja er burtur.

Og har varð enn einaferð staðfest, at bingjan skal flytast. Men av tí, at hon er full av hoyggi, fær bóndin freist til 1. juni.

Samstundis fær hann 3000 krónur í bót fyri ikki at hava aktað tann dómin um, at bingjan skal burtur. Og aktar hann heldur ikki hesuferð, so at hann hevur beint bingjuna burtur í seinasta lagi, 1. juni, fær hann aðrar 3000 krónur í bót um mánaðin, til hann hevur gjørt eftir boðunum.

Bóndin boðaði rættinum frá, at hann er sinnaður at akta boðini og tí má hann í minsta lagiflyta bingjuna einar 100 metrar.